Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Maria Müller 80 ár

Í dag, mánadagin 10. apríl, verður Maria Jacobina Müller í Havn 80 ár. Mia hevur alla sína tíð búð í Havnini.

Foreldrini hjá Miu vóru Christina fødd Jacobsen og ættað av Oyri suðuri í Vági, og Jóhan Hansen ella Hanneba í Funningsstovu, sum hann varð nevndur. Tey búðu í Tvørgøtu, og Mia vaks sostatt upp í Rabarbukvarterinum, sum tað plagar at verða tikið til. Christina og Hanneba fingu tríggjar døtrar og ein son, Lisa, Mia, Elinborg og Poul. Elinborg búsettist í Keypmannahavn, og hini í Havnini. Poul doyði nøkur ár herfyri.

Mia tænti í Gongini hjá Ebbu Müller, sum var einkja eftir H. C. Müller, ið var juristur, reiðari og DFDS umboðsmaður. Hann doyði av sponsku sjúku longu í 1925, og Ebba helt fram við virkseminum. Eitt nú var hon formaður í reiðarafelagnum. Ebba og H. C. Müller fingu tveir synir. Eiden og Ebbe, sum var ungur, tá ið hann doyði.

Mia og Eiden funnu saman, og tey giftust í Keypmannahavn í 1947. Eiden lærdi til journalist, og hann var í praktikk á Politiken í danska høvuðsstaðnum, tá ið tey bæði giftust. Tá ið tey komu aftur til Føroya, búsettust tey úti á Landa-



vegnum í nýbygdum húsum hinumegin Rættará.

Luturin hjá Miu hevur verið tann sami, sum hann var hjá so mongum øðrum føroyskum húsmøðrum. Hon helt hús og hjúklaði um mann og synir. Heimið hjá Miu og Eiden var miðdepul á so mangan hátt. Har var ongantíð gjørdur munur á høgum ella lágum. Har var altíð vitt til veggja og høgt til loftið. Ikki minst hjá dreingjunum og teirra vinfólkum. Har savnaðust børnini við Landavegin, og har komu vinfólkini hjá dreingjunum, tá ið teir vóru vornir unglingar.

At so nógv fólk savnaðist har var ikki minst Miu og hennara góða, tolna og sosiala lyndi fyri at takka. Hon hevur altíð verið fyrikomandi og blíð, og øll kendu seg væl inni hjá henni. Tíðindi og journalistikkur hava altíð átt stórt pláss í familjuni. Tað kravdi nógv tol og áhuga at hava journalist í húsinum, sum altíð var »på farten«. Mia hevur eisini sjálv fylgt væl við í tí, sum fór fram rundan um fyrst mannin og seinni eisini sonin, eitt nú hesi seinastu mongu árini á stóru altjóða sjónvarpsrásunum og tískil verið góður stuðul hjá journalistunum í familjuni.

Eiden doyði í 1988, men Mia býr framvegis í húsunum við Landavegin.

Mia og Eiden fingu tríggjar synir. Frank (1948), Jan (1951) og Michael (1954). Mia hevur 8 ommubørn og 2 langommubørn.

Føðingardagurin verður hildin saman við familjuni, á Norðasta Horni.

## Andlát og jarðarferðir

**Brynhild Solveig Hansen,** fødd Jacobsen, ættað av Slættanesi, búsitandi í Sørvági, andaðist á Landssjúkrahúsinum 8. apríl, 84 ára gomul. Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum týsdagin kl. 16.00. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju mikudagin kl. 14.00. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey, ið vilja minnast Brynhild kunnu lata Sørvágs kirkju eina gávu. Konta í peningastovunum.

**Linhild Johannesen,** fødd Lydersen, ættað úr Skálavík, búsitandi á Glyvrum andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 6. apríl, 46 ára gomul. Jarðarferðin verður týsdagin 11. apríl klokkan 14 úr Glyvra kirkju.

Tey, sum vilja minnast Linhild kunnu lata eina gávu til Missións- og Ungomshúsið á Glyvrum, konta í Føroya Banka.

**Lussi Wolfsen,** fødd Justinussen, ættað úr Tórshavn, búsitandi í Svøríki fer til gravar úr Ivetofta Kyrka, Brom hósdagin 13. apríl klokkan 10:30.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum at kæra kona, mamma, vermamma, dóttur og systir okkara

**Linhild Johannessen**
fødd Lydersen,
ættað úr Skálavík, búsitandi á Glyvrum

andaðist á Landssjúkrahúsinum hósdagin 6. apríl, 46 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Glyvra kirkju týsdagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Heri, Louis, Siri og Janna**

*Tey, ið vilja minnast Linhild, kunnu lata eina gávu til Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum. Konto í Føroya Banka..*

**Dagurin 10. apríl – Ezekiel**

Ein av teimum fýra stóru profetunum í Gamla Testamenti.

Navnið merkir Gud er sterkur.



# Fyrsti konfirmantarnir í 20'indu øld:

19 konfirmantar blivu fermdir í Havnar kirkju tann 22. apríl 1900, 9 gentur og 10 dreingir.

Hendan myndin er merkiligt nokk bara av gentunum. Teir 19 konfirmantarnir ið blivu fermdir um árið 1900 vóru: Emmy Bang, Anna Sofie Charlotte Marie Dam, Lise Margrethe Danielsen, Marin Egholm, Maren Louise Dorothea Mohr, Christine Marie Poulsen og Maren Cathrine Vilhelmsen (allar úr Havn), síðani eru tað Christine Frederikke Danielsen (Koltur) og Mortine Mortensen (elev i Thorshavns realskole).

Dreingirnir vóru: Joen Dam, Johan Erik Hansen, Peter Alberg Isaksen, Jens Jensen, Ove Lützen, Johannes Sofus Olsen, Poul Andreas Johannes Marius Poulsen, Nikkels Theodor Frederik Vilhelmsen (allir úr Havn) og Johan Mads Berg Niclassen (Velbastað).
Vit kenna bert tað einu gentuna, tað er gentan nr 1 f.v. fremst, hon er Anna Sofie Charlotte Marie Dam, giftust Anthony Nielsen, fyrsta barberinum í landinum. Nógv kend nøvn eru á yvirlitinum, so um onkur eigur mynd av dreingjunum, ella mynd har dreingirnir og genturnar eru saman, frætta vit vónandi. Hettar eru teir fyrstu konfirmantarnir í Havn í 20'undu øld, tí er umráðandi at lesararnir hyggja eyka væl eftir myndini, so vit fáa øll nøvnini uppá pláss. Her kann eg leggja afturat, at vegna sótt varð ongin konfirmatión um heysti í 1900.

Fyri at fáa nøvnini uppá pláss, vóna vit at tit kenna mammuna ella ommuna á myndini. Vinarliga ring til Birgar tlf. 314647 ella 214647.

Lesið
Sosialin
-tað loysir seg